# Arbeiðsloysisskipanin

ÁRSFRÁSØGN 2016

www.als.fo

ALS

# Upplýsingar um Arbeiðsloysisskipanina

**FELAGIÐ**

Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
Telefon: 349550
Telefax: 349551
Heimasíða: www.als.fo
Teldupostadressa: als@als.fo

**ROKNSKAPARÁR**

1. januar – 31. desember

**STÝRIÐ**

Eyðfinnur Jacobsen, formaður
Georg F. Hansen
Jógvan Jespersen
Magnus Pauli Glerfoss
Marita Rasmussen
Óluva í Gong
Snorri Fjallsbak

**STJÓRN**

Magni á Deild Olsen, stjóri

**GRANNSKOÐAN**

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f
Staravegur 17
100 Tórshavn

## INNIHALDSYVIRLIT


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um Arbeiðsloysisskipanina | 2 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Váttanir frá óheftum grannskoðara | 5 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 6 |
| Frágreiðing frá leiðslu | 8 |
| Búskapur | 20 |
| Nýttur roknskaparháttur | 28 |
| Rakstrarroknskapur | 29 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember 2016 | 30 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2016 | 31 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2016 | 32 |
| Notur til ársfrásøgnina | 34 |

# Leiðsluátekning

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri 1. januar – 31. desember 2016 hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Stjórnin og stýrið meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu grunsins tann 31. desember 2016 umframt av úrsliti og peningastreymum grunsins fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2016.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara fatan eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Tórshavn, tann 18. mai 2017

**STJÓRN**

**Magni á Deild Olsen**
stjóri

**STÝRIÐ**

**Eyðfinnur Jacobsen**
formaður

**Magnus Pauli Glerfoss**

**Georg Hansen**

**Jógvan Jespersen**

**Snorri Fjallsbak**

**Marita Rasmussen**

**Óluva í Gong**

# Til leiðsluna í Arbeiðsloysisskipanini

## ÁTEKNING Á ÁRSROKNSKAPIN

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2016 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymsuppgerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

## ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSROKNSKAPINUM

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Ein grannskoðan ber eisini í sær, at mett verður, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2016 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## UMMÆLI AV LEIÐSLUFRÁGREIÐINGINI

Vit hava, sum ásett í ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 18. mai 2017

**SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f**

Jóhannes Færø
statsaut. revisor

# Høvuðs- og lyklatøl

## GONGDIN SEINASTU 5 ÁRINI KANN LÝSAST VIÐ HESUM HØVUÐS- OG LYKLATØLUM:

| | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | tkr. | tkr. | tkr. | tkr. | tkr. |
| **Úrslit** | | | | | |
| Inngjøld | 210.145 | 202.206 | 189.882 | 183.489 | 180.540 |
| Bruttoúrslit | 98.887 | 61.928 | 14.19 | -20.603 | -71.560 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 83.777 | 45.303 | -3.847 | -38.435 | -89.475 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | 11.308 | 5.221 | 11.262 | 11.774 | 15.039 |
| Ársúrslit | 93.936 | 49.025 | 5.518 | -28.520 | -77.096 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavnvág | 463.733 | 369.473 | 323.682 | 317.344 | 345.483 |
| Eginogn | 455.361 | 361.424 | 312.398 | 306.881 | 335.402 |
| **Peningastreymar** | | | | | |
| Peningastreymar: | | | | | |
| Rakstur | 94.908 | 50.927 | 2.063 | -25.793 | -87.252 |
| Tal av starvsfólki | 34 | 43 | 39 | 34 | 29 |
| **Lyklatøl í %** | | | | | |
| Høvuðsavkast | 18,1% | 12,2% | -1,1% | -12,1% | -26,0% |
| Tryggleikastig | 98,2% | 97,8% | 96,5% | 96,7% | 97,1% |
| Eginpeningsavkast | 23,0% | 14,6% | 1,8% | -8,8% | -20,6% |




**Marianna Eysturoy**
móttøkan

# Frágreiðing frá leiðslu

Árið 2016 gjørdist eitt gott ár hjá Arbeiðsloysisskipanini.

Fíggjarliga royndist árið framúr, tí úrslitið gjørdist tað næstbesta í 25-ára søguni hjá ALS.

Eisini í aðrar mátar var 2016 eitt gott ár. Arbeiðsloysið var tað lægsta í átta ár, og hagtølini vísa, at ikki bara hava tað verið færri fólk, sum hava verið rakt av arbeiðsloysi, men hesi fólkini hava eisini verið styttri arbeiðsleys. Tað er eisini at fegnast um, at ungdómsarbeiðsloysið er sera avmarkað, og at talið av fólkum, sum eru langtíðararbeiðsleys, eisini er lágt.

Sambært Hagstovuni var árstíðarjavnaða miðal arbeiðsloysið í 2016 2,8%, sum er 0,1% stig minni enn árið fyri. Hetta er, sum nevnt, tað lægsta síðani 2008, tá arbeiðsloysið var søguliga lágt, 1,3%.

Jaligu avleiðingarnar av uppgongutíðunum seinastu 4-5 árini, har talið av løntakarum og samlaðu útgoldnu lønirnar hava verið støðugt hækkandi, samstundis sum arbeiðsloysið hevur verið støðugt lækkandi, síggjast aftur í fíggjarligu viðurskiftunum hjá Arbeiðsloysisskipanini. Samlaðu inngjøldini hava ongantíð, síðani ALS varð stovnað í 1992, verið hægri. Eisini hava útgjøldini samstundis verið tey lægstu seinastu átta árini. Úrslitið av hesum er, at avlopið hjá ALS í 2016 gjørdist slakar 94 mió. krónur, sum er tað næstbesta úrslitið í søguni hjá ALS. Tað var bert í 2002, tá ársúrslitið var 107 mió. krónur, at tað hevur verið betri enn í 2016.

Við góða úrslitinum í 2016 er samlaða avlopið, síðani gongdin vendi fyri trimum árum síðani, komið upp á 148,5 mió. krónur, og skipanin er harvið styrkt væl fíggjarliga. Enn er tó langt eftir á mál at vinna hallini tey fýra árini frá 2010 til 2013, sum samanlagt vóru 396 mió. krónur, inn aftur.

Tað er at fegnast um, at úrslitið í 2016 gjørdist so gott, tí skal skipanin hava neyðuga fíggjarliga máttin at standa ímóti við, tá tíðirnar aftur fara at versna, er tað alneyðugt at styrkja skipanina, nú hákonjunkturur er, og arbeiðsloysið er lágt.

Stýrið fyri ALS hevur sett sær sum mál, at Arbeiðsloysisskipanin skal javnviga fíggjarliga, tá arbeiðsloysið er millum 4,25% og 4,50%. Hetta markið hevur støði í søguliga arbeiðsloysinum og merkir, at tá arbeiðsloysið er niðanfyri 4,25-4,50%, skal skipanin hava avlop, meðan hon hevur hall, tá arbeiðsloysið fer upp um 4,5%.

Broytingar vórðu gjørdar í skipanini í 2015, har millum annað inngjaldsloftið varð hækkað, eins og aðrar broytingar eisini vórðu framdar. Nú hesar broytingar hava fingið fullan

ARBEIÐSLEYS Í % AV ARBEIÐSFJØLDINI – ÁRSMIÐAL



virkna, ber til at staðfesta, at við verandi fyritreytum er málið at tryggja langtíðarhaldførið hjá Arbeiðsloysisskipanini mest sum rokkið.

## MINKANDI ARBEIÐSLOYSI

Síðani arbeiðsloysið var í hæddini í nýggjari tíð í 2011, tá tað kom upp á 7%, hevur tað verið støðugt fallandi, og miðal arbeiðsloysið í 2016 var 2,8%.

Við tí arbeiðsstyrkini, sum er í løtuni, svarar eitt arbeiðsloysi á 2,8% til, at sløk 800 fólk vóru fulltíðararbeiðsleys. Av teimum fingu í miðal 504 fólk arbeiðsloysisstuðul frá ALS. Tey, sum ikki fingu arbeiðsloysisstuðul frá ALS, fingu forsorg vegna arbeiðsloysi frá Almannaverkinum.

Tað eru eingi ítøkilig tekin um, at jaliga gongdin, sum hevur verið í 2016, ikki heldur fram í 2017, og verður eingin óvanligur skelkur í føroyska búskapinum, er tí sannlíkt, at arbeiðsloysið verður uppaftur lægri í 2017.

## GONGDIN Í 2016

Hóast arbeiðsloysið aftur minkaði í 2016, so var minkingin ikki so stór, sum hon var undanfarna ár. Arbeiðsloysið var rættiliga støðugt stórar partar av 2016, og var okkurt styttri tíðarskeið hægri í 2016 sammet við sama tíðarskeið árið frammanundan. Við árslok var tað kortini nakað lægri enn við árslok árið fyri.

Á sama hátt sum í 2015 sæst aftur í 2016 ein lítil vøkstur á hásumrinum í juli mánaði, men tað er ógreitt, hvør orsøkin var til hetta.

Tá árið byrjaði, var arbeiðsloysið 2,7%, og við árslok var tað 2,5%.

## FÆRRI KOMU Í SKIPANINA

Sum arbeiðsloysið minkar, eru tað eyðsæð færri, sum koma í Arbeiðsloysisskipanina, meðan fleiri fara úr henni.

Men hóast arbeiðsloysið yvirhøvur aftur var lágt í 2016, so vóru tað hóast alt rættiliga nógv fólk, sum vóru arbeiðsleys í styttri ella longri tíðarskeið.

Tað vóru stovnaði samanlagt 1.380 arbeiðsloysi í 2016, meðan 1.468 fólk fóru úr skipanini.

Av hesum eru nøkur, sum hava verið arbeiðsleys í fleiri umførum.

Samanborið við árið fyri vóru 40 færri arbeiðsloysi stovnað í 2016, meðan 249 færri vórðu strikað.

ARBEIÐSLOYSIÐ 2015 OG 2016




ALS
STARV.FO
STARVSØKJ
ØLL STØRV
FÁ FRÁBOÐAN UM NÝGGJ STØRV
www.als.fo
SEND OKKUM STARVSLÝSING

## TAL AV STOVNAÐUM OG STRIKAÐUM ARBEIÐSLOYSUM




### FØROYAR HAVA LÆGSTA ARBEIÐSLOYSIÐ

Samanborið við onnur lond í Evropa, so var arbeiðsloysið í Føroyum við árslok í 2016 annað ár á rað tað lægsta yvirhøvur. Í Noreg, har arbeiðsloysið seinastu árini hevur verið sera lágt og vanliga hevur verið lægri enn í Føroyum, var arbeiðsloysið við árslok í 2016 væl hægri enn í Føroyum, meðan Ísland, sum í fleiri ár hevur havt rættiliga høgt arbeiðsloysi, við árslok í 2016 var tað land í Evropa, sum hevði næstlægst arbeiðsloysi.

### FLEIRI LØNTAKARAR

Gongdin við minkandi arbeiðsloysi sæst í ávísan mun aftur í talinum av løntakarum, sum hevur verið vaksandi seinastu fýra árini.

Ikki óvæntað er eitt ávíst samsveiggj millum arbeiðsloysið og talið av løntakarum soleiðis, at tá talið av løntakarum veksur, so minkar arbeiðsloysið.

Tað er eisini eitt øvugt samsveiggj millum arbeiðsloysið og nettoflyting soleiðis, at tá arbeiðsloysið minkar, vísir tað seg, at nettoflytingin til Føroyar veksur – og øvugt.

Við árslok í 2016 vóru tað 25.812 løntakarar í Føroyum. Hetta er 627 fleiri enn eitt ár frammanundan.

### LØNARGJALDINGARNAR HÆKKA

Aftur í 2016 – sjeynda árið á rað – hækkaðu samlaðu lønargjaldingarnar og komu upp á slakar 8,5 mia. krónur. Tað eru 450 mió. krónur meiri enn í 2015, svarandi til ein vøkstur á 5,6%.

Lønargjaldingarnar fyrsta ársfjórðing í 2017 vóru 6,1% hægri enn sama ársfjórðing árið fyri, so tekin eru um, at vøksturin í samlaðu lønargjaldingunum heldur fram í 2017.

### FÓLK STEÐGA STYTTRI HJÁ ALS

Árini frá 2009 til 2013 vístu, at fólk, sum einki arbeiði høvdu, vóru alsamt longri arbeiðsleys. Tey fólkini, sum fóru úr skipanini í 2013, høvdu í miðal verið arbeiðsleys í 254 kalendaradagar.

Tann gongdin vendi í 2014, tá fólk fyri fyrstu ferð í fimm ár steðgaðu styttri í ALS enn undanfarna ár, og henda gongdin helt fram í bæði 2015 og 2016.

Fólkini, sum fóru úr aftur ALS í 2014, høvdu í miðal steðgað 227 kalendaradagar, meðan tey, sum fóru úr skipanini í 2015, høvdu steðgað í 212 dagar í miðal. Tey 1.468 fólkini, sum fóru úr skipanini í 2016, steðgaðu í miðal í 165 dagar hjá ALS.

ARBEIÐSLOYSI SAMMETT VIÐ ONNUR LOND




Verður hugt eftir, hvussu leingi tey fólkini, sum til eina og hvørja tíð eru í skipanini, hava verið arbeiðsleys, so er myndin tann sama.

Tað vísir seg, at tíðarskeiðini, fólk hava verið arbeiðsleys, eru vorðin alsamt styttri síðani á sumri í 2012 og fram móti árslok í 2016.

Tey, sum vóru í skipanini við árslok í 2015, høvdu í miðal steðgað í 196 kalendaradagar, meðan tey, sum vóru í skipanini við árslok 2016, høvdu í miðal verið í ALS í 168 dagar.

Hetta, at fólk steðga styttri, er sera jaligt, og tað er eitt av aðalmálunum hjá ALS, at fólk fara so skjótt aftur til arbeiðis ella undir útbúgving sum til ber.

Tað hevur eisini stóran búskaparligan týdning fyri ALS, at fólk steðga styttri. Í og við at tey 1.468 fólkini, sum fóru úr skipanini í 2016, í miðal steðgaðu 47 kalendaradagar styttri enn tey, sum fóru úr skipanini í 2015, var samlaða útgjaldið av hesi orsøk í 2016 slakar 28 mió. lægri, enn tað annars hevði verið, um fólkini steðgaðu líka leingi sum árið fyri.

Tølini eru miðaltøl fyri øll tey, sum hava verið í Arbeiðsloysisskipanini, og tað eru eyðsæð stórir munir á, hvussu leingi fólk steðga. Summi – serliga tey ungu – steðga stutt og fara skjótt aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg, meðan tað er ein størri avbjóðing hjá teimum eldru at vinna seg út aftur á arbeiðsmarknaðin.

Hagtølini vísa eisini, at galdandi fyri allar aldursbólkar uttan tey, sum eru yngri enn 20 ár, er tað so, at kvinnurnar hava verið longri arbeiðsleysar enn menninir.

Ikki óvæntað er ein rættiliga greiður samanhangur millum generella arbeiðsloysið í Føroyum og longdina á tíðini, fólk eru arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið – mátað sum fulltíðararbeiðsleys í % av samlaðu arbeiðarafjøldini – minkar, so eru fólk

yvirhøvur styttri arbeiðsleys. Tað vil siga, at tað ganga færri dagar frá tí, fólk gerast arbeiðsleys, til tey fara úr Arbeiðsloysisskipanini aftur, og tá arbeiðsloysið hækkar, eru fólk longri arbeiðsleys.

### FÆRRI DETTA ÚT

Sambært reglunum ber til at vera í Arbeiðsloysis-skipanini í 648 útgjaldsdagar í eitt fýra ára skeið.

Tað merkir, at tá ein persónur røkkur hesar 648 dagarnar, so kann viðkomandi ikki longur fáa arbeiðsloysisstuðul frá ALS og dettur tí úr skipanini.

Tey trý árini frá 2008 og fram til 2010 vóru tað í miðal á leið 20-30 fólk um árið, sum rukku fullum dagatali og duttu úr skipanini.

Í 2011 vaks talið munandi, og tey trý árini frá 2011 til 2013 var talið á fólkum, sum duttu úr skipanini, árliga millum 100 og 140.

Hóast talið enn var høgt í 2013, so vendi gongdin tá, og talið fór at minka. Í 2014 vóru tað bara 45 fólk, sum duttu úr skipanini vegna fult dagatal, og í 2015 var talið 39.

Hóast talið enn er ov høgt, tí helst skal eingin detta úr Arbeiðsloysisskipanini, tí tey hava brúkt allar 648 dagarnar – so er at fegnast um, at talið hóast alt er munandi lægri, enn tað var árini frá 2011 til 2013.

Í 2016 vóru tað 47 fólk, ið rukku teimum 648 døgunum og tí duttu úr skipani.

### SNÝR SEG FRAMVEGIS UM AT FARA FYRR AFTUR TIL ARBEIÐIS

Hóast arbeiðsloysið er metlágt, er tað framvegis greiða sannføringin, at týdningurin av at hava eitt arbeiði at fara til hvønn morgun hevur ovurstóran týdning fyri tey allar flestu.

Tí verður áhaldandi dentur lagdur á at virka fyri, at fólk sum skjótast fara aftur til arbeiðis ella at útbúgva seg. Eisini fyri at tryggja, at føroyskir arbeiðsgevarar so skjótt og lætt sum til ber fáa starvsfólk við teimum førleikunum, teimum tørvar.

Arbeiðið at knýta tættari sambond við bæði arbeiðs-gevarar og við viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava, men sum brennandi ynskja sær at fara aftur til

TAL AV LØNTAKARUM Í 2016




LØNARGJALDINGAR ÁRINI 2000 – 2016 (MIÓ. KR.)




TAL AV DØGUM, FÓLK Í MIÐAL HAVA VERIÐ ARBEIÐSLEYS – BERT TEY, SUM ERU FARIN ÚR SKIPANINI



arbeiðis hevur alstóran týdning, og enn størri dentur verður nú lagdur á hendan partin.

Eftir at hava húsast á Sandvíkarhjalla í sløk tvey ár, flutti Fjølsmiðjan í februar mánaði 2016 oman í bygningin hjá Havnar Arbeiðarafelag á Tinghúsvegnum. Við hesum vórðu karmarnir og virksemið lagað til lægra arbeiðsloysið, og starvsfólkini vórðu savnað í umhvørvinum á Tinghúsvegnum.

Virksemið í Fjølsmiðjuni hevur alstóran týdning í mun til at knýta sambond við tey viðskiftafólkini, sum einki arbeiði hava. Royndirnar seinastu skjótt trý árini hava verið góðar og týðiliga víst okkum, hvussu týdningarmikil hesin parturin er.

Lága arbeiðsloysið hevur við sær, at vit megna at røkka størri part av hesum viðskiftafólkum og at røkka teimum fyrr. Tí verða nú øll viðskiftafólk boðin at hitta okkum heilt skjótt eftir, at tey eru komin í skipanina. Fleiri verða boðin til eina samrøðu longu áðrenn, tey eru endaliga komin í skipanini. Onnur verða boðin til starvsprát longu á leið ein mánað eftir, at tey er vorðin arbeiðsleys, og tey, sum framvegis eru í skipanini eftir tveimum mánaðum, verða boðin til innleiðsluviku í Fjølsmiðjuni. Eins og á starvsprátunum verður á innleiðsluvikuni lagdur stórur dentur á týdningin av at koma aftur á arbeiðsmarknaðin skjótast til ber. Á innleiðsluvikuni verður eisini tosað um, hvørji størv tey ymsu kundu hugsað sær. Vit tosa um styrkir og avbjóðingar, og vit eggja viðskiftafólkunum at síggja alternativar møguleikar. Vit fyrireika tey eisini at søkja størv og at fara til starvssamrøður, og teimum, sum tørvar hjálp, veita vit tað í tann mun, vit kunnu.

Týðandi partur av virkseminum á Fjølsmiðjuni er eisini tað, ið fer fram á breytunum. Tær eru tríggjar í tali – timburbreyt, kreativ breyt og køksbreyt. Umframt at vera karmar fyri at hitta starvsfólkini og knýta tættari sambond við tey, so fáa viðskiftafólkini høvið at royna seg við ymsum framleiðslum á breytunum.

Umframt starvsprát, innleiðsluviku og virksemið á breytunum verður skipað fyri hópin av øðrum átøkum og skeiðum eisini.

Tey ungu er ein serligur bólkur, sum vit vísa serligan ans. Tey hava meiri avmarkaðar arbeiðsroyndir, og eru í fleiri førum ikki so væl útbúgvin, sum tey nakað eldru fólkini, og tí verður stórur dentur lagdur á at stuðla teimum í at koma sum skjótast aftur til arbeiðis.

Endamálið við øllum virkseminum er at stuðla undir, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis, og at avmarka neiligu árinini, sum arbeiðsloysið hevur við sær.

Í eldhuginum eftir at sleppa at gera mun eiga vit á Arbeiðsloysisskipanini kortini altíð at hava í huga, at tað eru menniskju, vit arbeiða saman við. Menniskju, sum eru komin

MIÐALLONGD Á ARBEIÐSLOYSUM (KALENDARADAGAR)



í tí keðiligu støðu, at tey einki arbeiði hava. Tí eiga vit altíð at vera ansin og hava virðing fyri hesum menniskjum, og tað, vit taka stig til, má geva meining – bæði fyri tey og fyri okkum á ALS. Við tí virðingini í huga eru vit sannførd um, at ALS eigur og kann gera mun, og at vit eiga at hava ein virknan leiklut í at stuðla fólki í aftur at nærkast arbeiðsmarknaðinum

**KUNNINGARTØKNI**

Kunningartøkni verður ein alt meiri týðandi partur av gerandisdegnum hjá starvsfólkunum á ALS. Tað eru fleiri ymiskar kt-skipanir, ið vera nýttar á ALS. Summar eru standardskipanir, meðan aðrar eru serligar skipanir, sum tað, hóast keyptar uttanífrá, er neyðugt at laga til, so tær standa mát við tørvin hjá ALS. Aftur aðrar eru so serligar, at neyðugt er at menna tær júst til ALS. Dømi um tað er nýggja fakskipanin, nevnd Smúffan, sum er ment innanhýsis av starvsfólki hjá ALS.

Hendan skipanin er skræddaraseymað til virksemið og tørvin hjá ALS. Hon varð tikin í nýtslu í desember mánaði í 2015, og royndirnar við Smúffuni hava verið góðar. Skipanin ger, at arbeiðið verður lættari, skjótari og tryggari, og ein vinningur við Smúffuni er, at síðan hon varð tikin í nýtslu hevur borið til at flutt arbeiðsorku til onnur øki, har tørvurin hevur verið størri.

Eftir at hava brúkt journalskipanina ScanJour í úti við 20 ár, varð hon skift út við aðra og betri skipan, ið kallast SPSYS, og sum er ment í Danmark til serliga danskar kommunur.

Hetta skiftið hevur havt við sær, at ALS sparir á leið 200 tús. krónur árliga í loyvisgjøldum og øðrum.

Á ALS verður áhaldandi arbeitt við at gagnnýta møguleikarnar við nýggjari tøkni, og næsta stóra stigið verður at menna tænastur, sum fara at verða møguligar í kjalarvørrinum á Talgildu Føroyar-verkætlanini. Tað fyrsta verður at menna eitt talgilt umsóknarblað, har viðskiftafólk talgilt sjálvi kunnu fylla út umsóknarbløð um arbeiðsloysisstuðul og har nýta talgilda samleikan, sum er partur av Talgildu Føroyum.

Seinni er ætlanin at menna aðrar tænastur eisini.

Saman við Trygdargrunninum er ALS ein av stuðlunum hjá Talgildu Føroyum. ALS hevur játtað at stuðla við 1,6 mió. krónum í eitt fýra ára skeið, meðan Trygdargrunnurin stuðlar við 400 tús. krónum sama tíðarskeið.

MIÐALLONGD Á ARBEIÐSLOYSI BÝTT Á KYN OG ALDURSBÓLKAR 2016




TAL AV FÓLKUM, SUM ERU DOTTIN ÚT VEGNA FULT DAGATAL



**EFTIRLITIÐ UMSKIPAÐ OG STYRKT**
Eftir at innanhýsiseftirlitið hevur virkað eftir sama leisti í nógv ár, er hesin leistur nú broyttur. Eftirlitið er styrkt og virkar nú í størri mun við at samankoyra ymsar skipanir og skráir, sum ALS hevur atgongd til.

Tað hevur við sær, at eftirlitið verður neyvari, og fyrstu úrslitini síggjast longu, tí komið er fram á fleiri viðskiftafólk, sum av órøttum hava fingið arbeiðsloysisstuðul, og sum ikki hava upplýst fyri ALS, at tey hava havt lønt starv, samstundis sum tey hava fingið útgoldið arbeiðsloysisstuðul.

Hetta eru álvarsmál, og eyðsæð verður goldni arbeiðsloysisstuðulin kravdur aftur, og í fleiri førum eru málini meldað til fútan.

Áhaldandi menning av nýggjari tøkni fer at hava við sær, at eftirlitið fer at verða enn neyvari og tryggari.

**FISKAVIRKISSKIPANIN**
Tørvur er á, at fiskavirkisskipanin verður eftirhugd og lagað til tann tørvin, sum er í dag. Stýrið hevur heitt á landsstýrismannin við samferðslumálum at gera ymsar broytingar í skipanini, men tær eru ikki framdar enn. Sannlíkt verður neyðugt við øðrum broytingum eisini.

Til tess at tryggja eitt gott samband við fiskavirkini hevur ALS sett sær fyri at vitja øll føroysku fiskavirkini javnan – minst eina ferð um árið. Fyrsta umfarið av vitjanum hevur verið, og hava báðir partar fegnast um hesar vitjanir, sum geva eitt skipað høvi at tosa nærri um eitt nú royndir og avbjóðingar við fiskavirkisskipanini.

ALS hevur havt eitt mál við Bakkafrost, har ósemja hevur verið um, hvørt arbeiðsloysisstuðul hevur verið goldin starvsfólkum á Bakkafrost av órøttum. ALS metti, at starvsfólkini høvdu fingið boð frá Bakkafrost um at fara í feriu, og høvdu harvið ikki rætt til arbeiðsloysisstuðul.

Bakkafrost helt hinvegin upp á, at talan var um steðg í framleiðsluni vegna vantandi rávøru.

Endin á hesum rættiliga prinsipiella málið varð hann, at Kærunevndin fyri Arbeiðsloysisskipanina gav Bakkafrost viðhald í kæru teirra og staðfesti, at hóast Bakkafrost hevði millum 22.000 og 28.000 tons av livandi fiski gangandi í ringunum, so var orsøkin til steðgin vantandi fesk rávøra.

**FØROYINGAR UTTANLANDS**
Føroyingar, sum arbeiða uttanlands, kunnu í summum londum tekna arbeiðsloysistrygging í landinum, teir arbeiða. Arbeiða teir í londum, har tað ikki ber til at tekna slíka trygging, ber til at tekna sjálvbodna trygging hjá ALS.

Teir føroyingar, sum arbeiða í øðrum norðurlondum, skulu sambært norðurlendsku avtaluni um almannatrygd sum meginregla vera tryggjaðir í landinum, teir arbeiða. Hesi kunnu tó sambært somu avtala søkja um at verða undantikin meginregluna og ístaðin vera tryggjað í landinum, tey búgva. Treytin fyri slíka undantøku er tó, at tað ber til at tekna trygging í landinum, tey búgva. Tað er eisini ein treyt, at avtala er millum londini bæði, sum loyvir slíkari undantøku.

Myndugleikarnir í Føroyum og í Noreg hava gjørt avtalu um, at føroyskir handverkarar og føroyingar, sum sigla í Noreg, kunnu vera almannatryggjaðir í Føroyum, hóast teir arbeiða í Noreg.

Hetta, at føroyingar, sum arbeiða í eitt nú Noreg, søkja um undantøku fyri at vera tryggjaðir í Noreg og í staðin vera tryggjaðir í Føroyum, hevur verið praktiserað í skjótt 20 ár uttan stórvegis avbjóðingar.

Nú er so tann støðan komin í, at føroyskur arbeiðsgevari ber seg undan at rinda arbeiðsgevarapartin av ALS-gjaldinum, tí viðkomandi vil vera við, at hann hevur ikki skyldu at rinda hetta gjaldið. Orsøkin er, at tað í ALS-lógini stendur, at ALS-gjald verður bara goldið av a-inntøku, og at inntøkan, sum hesi fólk hava, skattliga ikki er at meta sum a-inntøka.

ALS er av teirri fatan, at heimildirnar eru í lagi, og um føroyskur arbeiðstakari hevur søkt um og fingið undantøku fyri at verða almannatryggjaður í landinum, viðkomandi arbeiðir, so eigur viðkomandi at vera tryggjaður í Føroyum og rinda til almannaskipanirnar her.

Ósemjan er endað við, at málið hevur verið í Føroya Rætti, har niðurstøðan varð hon, at føroyskir arbeiðsgevarar hava ikki skyldu at rinda ALS-gjald av útgoldnum lønum, sum ikki eru a-inntøkur. Hetta merkir, at starvsfólk hjá føroyskum arbeiðsgevara, sum velur ikki at rinda ALS-gjald í Føroyum, lúka ikki treytirnar fyri at fáa undantøku fyri at vera almannatryggjað í landinum, tey arbeiða. Tað vil siga, at arbeiða hesi fólkini í Noreg, so kunnu tey ikki verða undantikin at verða almannatryggjað í Noreg.




**Snorri Patursson**
breytasamskipari á køksbreytini



## ÁRSFUNDURIN

Í mai mánaði í 2013 var fyrsti ársfundurin eftir ein steðg síðani miðskeiðis í nítiárunum hildin. Eingin ársfundur var í 2014, men hann hevur síðani verið í bæði 2015 og 2016. Ársfundur verður aftur 2. juni 2017.

Ársfundurin er at meta sum eitt slag av aðalfundi, har tey, ið varða av Arbeiðsloysisskipanini, hava høvið at kunna seg um virksemið, um støðuna og um útlitini fyri framtíðina

## LÓGARBROYTINGAR

Fyri millum annað at tryggja langtíðarhaldbarið hjá Arbeiðsloysisskipanini, heitti stýrið í 2015 á landsstýrismannin við vinnumálum at gera ymsar broytingar í løgfrøðiligu karmunum hjá Arbeiðsloysisskipani.

Fleiri av hesum broytingunum eru framdar, meðan aðrar enn mangla at verða framdar.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina hevur mælt landsstýrismanninum við kunngerð at gera broytingar í fiskavirkisskipanini, í skipanini við starvsvenjingum og at hækka gjøldini fyri sjálvbodnar tryggingar og tryggingar hjá sjálvstøðugum vinnurekandi.

Tað er ikki greitt, hvørt landsstýrismaðurin fer at taka tilmælini hjá stýrinum til eftirtektar, ella nær – um so verður.

Stýrið hevur eisini mælt landsstýrismanninum til at gera broytingar í lógini um arbeiðsloysisstrygging soleiðis, at heimildirnar at taka ímóti ALS-gjaldi av inntøkum, sum eru vunnar uttanlands, verða greiðari. Talan er serliga um inntøkur hjá fólki, sum starvast í norðurlondum, har avtala millum Føroyar og hesi norðurlond gera, at hesi fólk kunnu velja at verða sosialt tryggjaði í Føroyum heldur enn í landinum, tey arbeiða.

Hendan lógarbroyting er ikki framd enn.

## FASTI GERÐARRÆTTUR

Arbeiðsloysisskipanin hevur avtalu við Fasta Gerðarrætt at hýsa hesum stovni og at umsita ein part av hesi skipan. Fasti Gerðarrættur endurrindar Arbeiðsloysisskipanini fyri umsitingina, og í 2016 var samlaða upphæddin 67 tús. krónur.

## TRYGDARGRUNNUR FISKIVINNUNAR

Galdandi frá 1. juli 2011 hevur Arbeiðsloysisskipanin eisini avtalu við Trygdargrunn fiskivinnunar um, at tey halda til í hølunum hjá ALS.

Fyri samhýsingina rindaði Trygdargrunnurin ALS 1,2 mió. krónur í 2016.

Trygdargrunnurin fór í 2014 undir at endurnýggja kt-undirstøðukervið hjá grunninum. Í tí sambandi setti ALS fólk í starv at samskipa og stýra tí verkætlanini, og Trygdargrunnurin ber ALS allar útreiðslur av hesum aftur.

Komið er á mál við fyrstu pørtunum av hesi kt-verkætlan, men ætlanin er at halda fram at menna kt-skipanirnar hjá Trygdargrunninum, og tí fer starvsfólkið at halda fram hjá Trygdargrunninum.

## STÝRIÐ

Sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing frá 13. juni 1997, við seinni broytingum, verður stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina valt fyri fýra ár í senn.

Stýrið, sum situr nú, tók við 1. oktober 2013. Herálvur Joensen, sum hevur sitið í stýrinum síðani, fór í annað starv 1. januar 2017, og tók seg tí úr stýrinum. Í hansara stað er Jógvan Jespersen komin.

**INNGJØLDINI HÆKKA**

ALS-gjaldið hevur verið óbroytt 1,25% síðani 1. januar 2012, og síðani hevur verið ein støðugur vøkstur í samlaðu inngjøldunum hjá ALS.

Í 2015 vóru samlaðu inngjøldini 202,2 mió. krónur, og í 2016 komu tey upp á 210,1 mió. krónur. Ein vøkstur á 7,9 mió. krónur svarandi til 4%.

Hetta er tað mesta, samlaðu inngjøldini hava verið í 25-ára søguni hjá Arbeiðsloysisskipanini.

ALS-gjaldið var óbroytt í 2016, og tí stavar vøksturin í samlaðu inngjøldunum frá, at samlaðu lønarútgjaldingarnar í Føroyum hækkaðu í 2016.

Myndin niðanfyri vísir gongdina í ALS-gjaldinum og samlaðu inngjøldunum, síðani Arbeiðsloysisskipanin varð stovnað í 1992. Gula strikan vísir ALS-gjaldið, meðan stabbarnir vísa samlaðu inngjøldini.

**ÚTGJØLDINI HALDA Á AT MINKA**

Arbeiðsloysið hevur verið støðugt minkandi síðani ársbyrjan í 2011, tá tað var upp á tað mesta í nýggjari tíð.

Samlaðu útgjøldini eru neyvt knýtt at arbeiðsloysinum, og tí eru samlaðu útgjøldini eisini minkað støðugt hesi seinastu fimm árini.

Í 2016 vóru samlaðu útgjøldini 104 mió. krónur, sum eru 28,8 mió. krónur minni – svarandi til sløk 22% – enn í 2015.

Aftur í 2016 vóru tað serliga vanligu útgjøldini, sum minkaðu nógv. Úr 92,2 mió. krónum í 2015 niður í 71,5 mió. krónur í 2016. Ein minking á 20,7 mió. krónur, sum svarar til 22,5%

Útgjøldini umvegis fiskavirkisskipanina minkaðu eisini nakað í 2016. Úr 24,3 mió. krónum í 2015 niður í 20,2 mió. krónur í 2016.

Í miðal vóru tað færri fólk, sum fingu útgjald um fiskavirkisskipanina í 2016 í mun til árið fyri, og hesi fólkini fingu í miðal eisini minni útgoldið.

Samanborið við fyri tveimum árum síðani eru kostnaðirnir av starvsvenjing minkaðir niður í minni enn ein helming. Í 2014 vóru hesir kostnaðir 11,7 mió. krónur, og í 2015 vóru teir 7,5 mió. krónur. Í 2016 vóru kostnaðirnir 5,8 mió. krónur. Peningaligi týdningurin fyri ALS av starvsvenjingini er

ALS-GJALD OG SAMLAÐI INNGJØLD 1992 – 2016





**Fía Lindenskov**
kveikjari

avmarkaður, tí upphæddirnar, sum vera goldnar út í sambandi við starvsvenjingar, høvdu óansæð verið goldnar út sum vanligur arbeiðsloysisstuðul, hevði eingin starvsvenjing verið.

Upphæddirnar, ið hava verið brúktar til arbeiðsmarknaðarátøk og førleikamenning hjá viðskiftafólkunum, vóru vaksandi fram til 2014, men so hvørt sum arbeiðsloysið er minkað, eru minni upphæddir eisini brúktar til hetta endamál. Upphæddin í 2015 var 6,5 mió. krónur, meðan tað eru brúktar 4,8 mió. krónur í 2016.

Ein lutfalsliga stórur partur av samlaðu upphæddini verður brúktur til rakstur av Fjølsmiðjuni og tí virksemi, har er.

Samlaðu útgjøldini eru býtt soleiðis seinastu árini:

| **Mió. kr.** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** |
|---|---|---|---|---|
| Vanligur arbeiðsloysisstuðul | 71,5 | 92,2 | 120,8 | 151,7 |
| Starvsvenjing | 5,8 | 7,5 | 11,7 | 12,6 |
| Fiskavirkisskipanin | 20,2 | 24,3 | 22,6 | 24,4 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 1,9 | 2,3 | 2,9 | 3,4 |
| Førleikamenning og arbeiðsmarknaðarátøk | 4,8 | 6,5 | 8,0 | 4,2 |
| | **104,0** | **132,8** | **166,0** | **196,4** |

SAMLAÐI ÚTGJØLD 1992 – 2016



## LØNIR OG KOSTNAÐIR

Talið av starvsfólkum hevur verið vaksandi seinnu árini, men við virknaði frá 2016 vóru tillagingar gjørdar í starvsfólkahópinum, og talið av ársverkum minkaði úr 43 í 2015 niður í 34 í 2016.

Minkandi arbeiðsloysi, nýggj kt-skipan og umskipingar eru orsøkir til, at starvsfólkahópurin er minkaður rættiliga nógv í árinum.

Tað er so, at ALS í enn størri mun enn áður hevur sett sær fyri at hava ein virknan leiklut í, at fólk fara fyrr aftur til arbeiðis. Hetta verður gjørt á tann hátt, at sambandið og samstarvið við viðskiftafólkini er víðkað og betrað soleiðis, at vit betri kunnu hjálpa fólki aftur á arbeiðsmarknaðin, eisini so at neiligu árinini av arbeiðsloysi verða so avmarkað sum yvirhøvur til ber.

Tað, at talið av ársverkum er minkað munandi, sæst aftur í samlaðu starvsfólkaútreiðslunum, sum vóru 14,9 mió. krónur í 2016. Tað er stívliga 1,5 mió. krónur minni enn í 2015, tá tær vóru 16,4 mió. krónur.

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir vóru 6,1 mió. krónur í 2016. Árið frammanundan vóru teir 6,5 mió. krónur. Sostatt hevur tað aftur í ár borið til at minka um samlaðu rakstrarkostnaðirnar – hesaferð við 400 tús. krónum svarandi til 6% eftir einum ári. Sostatt eru rakstrarkostnaðirnir nú komnir niður um tað, teir vóru í 2008, tá arbeiðsloysið var metlágt.

Verður hædd tikin fyri roknskapartøkniligu broytingunum og eingangsútreiðslum, so er tað vorðið alsamt bíligari at reka ALS hesi seinastu árini.

SAMLAÐIR RAKSTRARKOSTNAÐIR 2004 – 2016 Í ÁRSINS PRÍSUM



Myndin niðanfyri vísir gongdina í samlaðu fyrisitingarútreiðslunum, avskrivingunum og mvg síðani 2004. Upphæddirnar eru í føstum 2004-prísum.

Sum myndin vísir, so eru hesar útreiðslur minkaðar úr 13,6 mió. krónum í 2010 niður í 6,6 mió. krónur í 2016. Ein minking á stívliga 53% eftir seks árum.

Umroknaðar til fastar 2004-prísir eru hesar útreiðslurnar nú væl niðanfyri tað, tær vóru afturi í 2008 og eru eisini niðanfyri tað, tær vóru í 2004.

Gongdin við munandi sparingum seinnu árini er úrslit av einum miðvísum arbeiði at fáa meiri fyri minni og spara allastaðni, har tað loysir seg og gevur meining.

Miðað verður eftir, at hesar útreiðslur fara at minka aftur komandi ár, og at ALS framhaldandi verður bíligari at reka.

**ÚRSLIT OG EGINOGN**

Úrslitið fyri avskrivingar og fíggjarpostar var eitt avlop á 83,8 mió. krónur. Til samanberingar var hetta úrslitið eitt avlop á 45,3 mió. krónur í 2015.

Avskrivingarnar í 2016 vóru 228 tús. krónur, sum er tað sama sum árið fyri.

Í 2014 vóru allar ognir burtursæð frá grundøkinum og bygninginum við Tinghúsvegin endaliga avskrivaðar, og tá øll keyp, sum frammanundan hava verið handfarin sum íløgur og avskrivað yvir fleiri ár, nú verða útreiðsluførd yvir raksturin, so eru samlaðu avskrivingarnar minkaðar munandi samanborið við 2014. Í árunum sum koma, verður tað bara bygningurin við Tinghúsvegin, sum verður avskrivaður. Tær avskrivingarnar fara at verða á leið 228 tús. krónur árliga.

Virðisbrævaognirnar vuksu úr 325,8 mió. krónur við ársbyrjan 2016 til 399,5 mió. krónur við árslok – hetta svarar til eina øking á sløk 23%

Fíggjaravkastið í 2016 var 11,3 mió. krónur, svarandi til 3,15% av virðisbrævaognunum. Samanborið við 2015, tá fíggjaravkastið var 5,2 mió. krónur, er talan um munandi bata.

ALS hevur ein varnan íløgupolitik, har dentur verður lagdur á at varðveita fíggjarognirnar. Fyri at avmarka váðan mest møguligt verður størsti parturin tí settur í lánsbrøv. Ein minni

FYRISITINGARÚTREIÐSLUR, AVSKRIVINGAR OG MVG Í FØSTUM 2004-PRÍSUM



partur verður settur í partabrøv, og tað gevur eitt gott íkast til samlaða fíggjaravkastið.

Avkastið á partabrøvunum var 2,6 mió. krónur, svarandi 5,63%, og avkastið á lánsbrøvunum var 8,7 mió. krónur, svarandi til 2,94%.

Góða gongdin á partabrævamarknaðunum og fallandi rentustigið eru høvuðsorsøkirnar til fíggjaravkastið, sum má metast verða nøktandi, givið varna íløgupolitikkin.

Ársúrslitið batnaði fimta árið á rað, og gjørdist eitt avlop á 93,9 mió. krónur. Samanborið við árið frammanundan er talan um eina betring á 92% – ella næstan eina tvífaldan av úrslitinum.

Við árslok í 2016 vóru samlaðu íløgurnar í virðisbrøv 399,5 mió. krónur, sum var 73,7 mió. krónur meiri enn eitt ár frammanundan.

í 2016 er tøki peningurin fleirfaldaður úr 5,3 mió. krónum við árslok í 2015 upp í 26,5 mió. krónur við árslok 2016. Gjaldførið hjá ALS er sera gott, og avlopsgjaldførið verður javnan sett í virðisbrøv so skjótt, tað verður mett skilagott.

Við ársbyrjan í 2016 var eginognin 361,4 mió. krónur, og við árslok var hon vaksin upp í 455,4 mió. krónur.

Tá eginognin var størst, tað var í august mánaði í 2009, var hon slakar 750 mió. krónur. Nú 7-8 ár seinni ber til at staðfesta, at hon síðani tá er minkað við 295 mió. krónum. Gongdin hesi árini vísir, at tað kann vera skjótt hvønn vegin, og at eginognin og harvið fíggjarligi mátturin hjá skipanini kann vikna skjótt, og tað vísir týdningin av, at skipanin er í eini tryggari legu, so hon verður fíggjarliga haldfør nógv ár fram í tíðina.

Við gongdini, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum seinastu á leið seks árini og við teimum tillagingum, sum eru gjørdar á Arbeiðsloysisskipanina, er neiliga gongdin vend, og skipanin vorðin betri før fyri at standa í móti komandi bakkastum.

**ÚTLIT FYRI 2017**

Tað er framvegis nógv ferð á føroyska búskapinum, og nógv virksemi er um so at siga alt landið. Tað sæst aftur í arbeiðsloysinum, sum hevur verið støðugt minkandi seinastu fimm árini.

ÁRSÚRSLIT 1992 -– 2016



# Búskapur

Búskaparvøksturin hevur verið óvanliga stórur, og Búskaparráðið roknar við, at vøksturin í búskapinum fer at halda fram eisini í 2017 og 2018. Vøksturin væntast ikki at verða eins stórur sum seinastu tvey árini, men í 2017 væntar Búskaparráðið, at vøksturin verður 6,9% og 4,4% í 2018 í ársins prísum.

Tað eru fleiri orsøkir til jaligu gongdina í búskapinum. Stór landingar- og útflutningsvirði av uppsjóvarfiski, høgir prísir á aldum laksi saman við støðugum nøgdum av útfluttum laksi, lágir oljuprísir og lutfalsliga stórar íløgur – bæði privatar og almennar – eru alt orsøkir, sum stimbra búskapin rætta vegin.

Hákonjunktururin hevur sannlíkt eisini verið orsøk til, at fleiri fólk velja at flyta til Føroyar at búgva og virka. Metlágt arbeiðsloysi og størri útboð av áhugaverdum og viðkomandi størvum er við til, at fleiri útbúnir føroyingar flyta aftur til Føroyar, og fólkatalið hevur ongantíð áður verið so høgt, sum tað er nú.

Hóast framhaldandi vøkstur í búskapinum, so metir Búskaparráðið, at tað er óheppið, at tað almenna ger stórar íløgur, samstundis sum nógv ferð annars er á búskapinum. Almennu íløgurnar eru sostatt konjunkturviðgangandi og kunnu økja um sveiggini í búskapinum. Tey mæla tí til, at tað almenna heldur førir ein konjunkturneutraliserandi fíggjarpolitikk og tekur størri atlit til tíðarvæl, tá farið verður undir almennar íløgur og bygging.

Tað er eisni framvegis ein avbjóðing, at avlopið hjá landskassanum ikki í nóg stóran mun stendur mát við útlitini til broytingar í eitt nú aldursamansetingini á fólkunum her búgva og tær avbjóðingar, ið koma í kjalarvørrinum á tí. Tað er væntandi, at útreiðslurnar hjá tí almenna fara at vaksa skjótari enn inntøkurnar, og at tað kann gerast ein stórur búskaparligur trupulleiki við tíðini.

Tað hevur í fleiri ár gingið serliga væl hjá alivinnuni, har prísirnir á laksi hava verið methøgir, og framleiðslan somuleiðis hevur verið stór. Føroysku alifeløgini gera framvegis nógvar, stórar íløgur, sum væntandi fara at hava við sær, at tað fer at bera til at økja enn meiri um framleiðsluna við verandi aliøkjum. Hetta fer at bera til, tí við útbyggingum av smoltstøðunum fara smoltini at ganga longri á landi og vera munandi størri, tá tey fara á sjógv. Við hesum fara tey at verða styttri tíð í sjónum, og umførini á ymsu aliøkjunum fara at verða fleiri. Eisini fer styttra tíðin í sjónum at hava við sær, at vandin fyri sjúku og lús verður minni.

Tað er ikki óhugsandi, at prísirnir á laksi í 2017 fara at vera á sama høga støði, sum teir vóru í 2016, og Búskaparráðið væntar, at tøkan í 2017 verður á leið tann sama sum í 2016.

Útflutningsvirðið vaks munandi í 2016 í mun til 2015, og vinnan roknar ikki við afturgongd í 2017.

Uppsjóvarvinnan hevur eisini havt fleiri góð ár við metúrslitum, og tað hevur eisini gingið rættiliga væl hjá virkjunum á landi, sum taka ímóti uppsjóvarfiski.

EGINOGN 1992 – 2016



Samlaða landingarvirðið á uppsjóvarfiski er nær um fýrafaldað frá 2009 til 2016, og er tað serliga økta kvotan av makreli, sum er orsøk til tað. Væntandi verður landingarvirðið á makreli enn hægri enn í 2016, og somuleiðis er væntandi, at landingarvirðið á sild og svartkjafti verður munandi hægri í 2017 samanborið við undanfarnu ár.

Stórar íløgur eru gjørdar í uppsjóvarvinnuni bæði á landi og sjógvi, og nógv fólk eru knýtt at hesi vinnu – serliga á landi. Millum annað tí hevur gongdin hjá hesi vinnuni – bæði beinleiðis og óbeinleiðis – stóra ávirkan á arbeiðsloysið. Serliga í ávísum pørtum av landinum, eitt nú í Suðri, har nógv arbeiðspláss eru á virkinum hjá Varðin Pelagic á Tvøroyri.

Hvat fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum viðvíkur, so sær einki serligt út. Avreiddu nøgdirnar hava yvirhøvur verið tær somu ella minkandi seinastu árini, og útlitini fyri 2017 eru einki serlig. Brexit kann fara at merkja, at prísirnir á fiski seldur til bretska marknaðin fara at lække, tí pundið lækkar.

Væntandi verður útflutningsvirðið av botnfiski á leið tað sama í 2017 sum í farna ári. Í besta føri verður talan um ein avmarkaðan vøkstur.

Góði toskafiskiskapurin við Flemish Cap er komin væl við hjá fleiri skipum í einum flota, har stórir partar hava verið í kreppu í nógv ár. Fiskiskapurin í Barentshavinum roynist væl, og støðan hjá tí partinum av fiskiskipaflotanum er góð.

Sitandi samgonga leggur í 2017 fram uppskot um fiskivinnunýskipan, men tað er torført at meta um, hvørjar avleiðingar nýskipanin fer at hava fyri føroysku fiskivinnuna.

Í byggivinnuni er framvegis úr at gera. Fleiri stórar verkætlanir eru í gongd, og hol er sett á aðrar. Byggingin av Marknagilsdeplinum hevur drigið út, men verður liðug komandi ár. Bakkafrost byggir risastóra smoltstøð í Klaksvík, og Luna byggir somuleiðis smoltstøðina á Fútakletti út. Landssjúkrahúsið verður bygt út, byrjað er at spreingja í Eysturoyartunnlinum, og farið verður í næstum undir at byggja nýggjan musikkskúla í Havn, umframt at nýggjur kommunuskúli eisini verður bygdur á Fløtum í Havn.

Harafturat er hópin av øðrum verkætlanum í byggivinnuni.

Tað eru tí greið tekin um, at nógva virksemið, sum er í byggivinnuni, fer at halda fram í 2017.

Eins og seinastu árini er ein avbjóðing hjá byggivinnuni at fáa starvsfólk við neyðugum førleikum. Ein avleiðing av tí verður sannlíkt, at tørvur framhaldandi verður á útlendskari arbeiðsmegi innan hesa vinnu í Føroyum – hetta hóast tað framvegis eru fleiri hundrað føroyingar, sum einki arbeiði hava. Tað ber boð um týdningin av at leggja dent á røttu útbúgvingarnar og førleikamenningina soleiðis, at útboðið av førleikum í størri mun stendur mát við eftirspurningin.

Samanumtikið síggja útlitini fyri 2017 út til at vera góð. Roknað verður við framhaldandi búskaparvøkstri, og virksemið tykist fara at verða stórt komandi ár eisini.

Fer tað at bera til at fáa betri samsvar millum útboð og eftirspurning av førleikum, so at tað ikki verður neyðugt við meiri útlendskari arbeiðsmegi í Føroyum, so fer arbeiðsloysið sannlíkt at verða enn lægri í 2017 í mun til 2016.

Arbeiðsloysisskipanin er styrkt, og við broytingunum, sum eru gjørdar á skipanina í seinastuni, er skipanin nú betri fyri at standa ímóti, skuldi arbeiðsloysið farið at vaksið aftur.

Tætta sambandi, ALS hevur við síni viðskiftafólk, sum eru arbeiðsleys, og sum brennandi ynskja sær eitt arbeiði, eigur at halda fram og verða styrkt komandi ár, og sama við sambandinum við føroysku arbeiðsgevararnar. Tað er eisini umráðandi, at arbeiðsmarknaðarátøkini við førleikamenning halda fram og verða styrkt. Tað er ikki gott at ganga fyri einki, og tað er umráðandi, at fólk koma skjótari aftur til arbeiðis, og føroyskir arbeiðsgevarar skjótari fáa skikkaða arbeiðsmegi til tey størvini, sum eru tøk.

## GONGDIN Í VIRKSEMINUM OG FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTUNUM HJÁ SKIPANINI

Rakstrarroknskapurin fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2016 til 31. desember 2016 vísir eitt avlop á 93.936.282 krónur móti einum avlopi á 49.025.086 krónur fyri tíðarskeiðið frá 1. januar 2015 til 31. desember 2015.

Tillagingarnar í skipanini, sum vórðu framdar í 2015, vísa seg at hava ætlaða virknaðin, og leiðslan er nøgd við úrslitið fyri 2016.

Gjaldførið er gott, og tøkur peningur, áogn og lætt umsetilig virðisbrøv hjá Arbeiðsloysisskipanini vuksu í 2016 við 94,5 mió. krónum úr 342.682.741 krónum upp í 437.170.782 krónur.

## HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK

Frá roknskaparloki til í dag er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Víst verður tó til pettið um Føroyingar uttanlands á síðu 18.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá Arbeiðsloysisskipanini fyri 2016 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í bólki C við teimum tillagingum, sum stýrið hevur mett neyðugt, og eftir løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

**UM INNROKNING OG VIRÐISÁSETING**

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar, eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

# Rakstrarroknskapur

**INNGJØLD**

Inngjøld frá arbeiðsgevarum og løntakarum verða innroknað í rakstrarroknskapin tá lønin sum ALS gjaldið verður roknað av, verður goldin. Inngjøld frá sjálvstøðugum vinnurekandi og sjálvboðin arbeiðsloysistrygging verða innroknað, tá trygging og váðaskifti er farið fram áðrenn árslok.

**ÚTGJØLD OG ÚTREIÐSLUR TIL ARBEIÐSLEYS**

Útgjøld til vanligan arbeiðsloysisstuðul, til arbeiðsloysisstuðul umvegis fiskavirkisskipanina, og til útreiðslur til starvsvenjing verða innroknaði í rakstrarroknskapinum tá hesi eru útgoldin. Útgjøldini eru tíðargreinaði soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men eru upptjent í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldugur arbeiðsloysisstuðul undir skuld í fíggjarstøðuni við árslok í roknskaparárinum.

Útreiðslur til arbeiðsleys fevnir um rakstrarútreiðslur av Vakstrarhúsinum og Fjølsmiðjuni, umframt skeiðsútreiðslur til arbeiðsleys.

**AÐRIR UTTANHÝSIS KOSTNAÐIR**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevnir um kostnaðir til lýsingar, umsiting, høli, innbúgv, edv, viðlíkahald, tap uppá skuldarar v.m. Harumframt verða vanligar íløgur td. í rakstrartól og innbúgv útreiðsluførd, sum aðrir uttanhýsis kostnaðir.

**STARVSFÓLKAKOSTNAÐUR**

Starvsfólkakostnaður fevnir um løn og samsýning umframt lønartengdar kostnaðir.

**AV OG NIÐURSKRIVINGAR**

Av og niðurskrivingar eru ársins av og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

**FÍGGJARLIGAR INNTØKUR OG KOSTNAÐIR**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentuinntøkur og kostnaðir.

**SKATTUR OG AVGJØLD**

Skattur og avgjøld fevnir um meirvirðisgjald, ið stavar frá keypi av vørum og tænastum.

Sambært løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum er Arbeiðsloysisskipanin undantikin skattskyldu.

## Fíggjarstøðan

**MATERIELL STØÐISOGN**
Grundøki og bygningar verða virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.

Viðvíkjandi aðrari materiellari støðisogn er gjørd tillaging í mun til ársroknskaparlógina soleiðis at hesar ognir ikki verða ognarførdar.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini og til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er sett út frá væntaðu brúkstíðini og restvirðum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Bygningar | 50 ár | 32 % |

Vinningur ella tap í sambandi við sølu av materiellari støðisogn verða gjørd upp sum munurin millum søluupphæddina, við frádrátti av sølukostnaði, og roknskaparliga virðið av støðisognini søludagin. Vinningur ella tap verða innroknað undir avskrivingar í rakstrarroknskapinum.

**ÁOGN**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

**VIRÐISBRØV OG KAPITALPARTAR**
Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað undir ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (børskursin) við roknskaparlok. Dagsvirðið verður ásett út frá seinast skrásetta sølukursinum.

**SKULD**
Onnur skuld verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar grunsins í árinum býtt á økini rakstrarvirksemi, íløguvirksemi og fíggjarvirksemi og broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening grunsins við ársbyrjan og ársenda.

**PENINGASTREYMUR FRÁ RAKSTRARVIRKSEMI**
Peningastreymurin frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir og broytingar í arbeiðskapitali. Arbeiðskapitalurin fevnir um ogn í umferð frádrigið stuttfreistaða skuld og tær upphæddir, sum eru partur av tøka peninginum.

**PENINGASTREYMUR FRÁ ÍLØGUVIRKSEMI**
Peningastreymurin frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp ella sølu av feløgum og virksemi umframt keyp ella sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn.

**PENINGASTREYMUR FRÁ FÍGGJARVIRKSEMI**
Peningastreymurin frá fíggjarvirkseminum fevnir um broytingar í støðd ella samanseting av stovnsfæi grunsins og kostnaðum knýttir at hesum umframt upptøku av lánum og gjaldan av avdráttum.

**TØKUR PENINGUR**
Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv, sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er uttan týdning.

**YVIRLIT YVIR HØVUÐS- OG LYKLATØL**

Høvuðsavkast $= \dfrac{\text{Úrslit áðrenn fíggjarpostar x 100}}{\text{Ognir til samans}}$

Tryggleikastig $= \dfrac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Ognir til samans við árslok}}$

Eginpeningsavkast $= \dfrac{\text{Úrslit eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$

# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember 2016

| | Nota | 2016 (kr.) | 2015 (tkr.) |
|---|---|---|---|
| **Inngjøld** | | **210.144.778** | **202.206** |
| Útgjøld og útreiðslur til arbeiðsleys | | 104.047.572 | 132.804 |
| Aðrir uttanhýsis kostnaðir | | 7.210.363 | 7.474 |
| **Bruttoúrslit** | | **98.886.843** | **61.928** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | 14.882.179 | 16.397 |
| Av og niðurskrivingar av materiellari støðisogn | 2 | 227.682 | 228 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **83.776.982** | **45.303** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 11.307.890 | 5.221 |
| **Úrslit áðrenn skatt og avgjøld** | | **95.084.872** | **50.524** |
| Skattur og avgjøld | | 1.148.590 | 1.499 |
| **Ársúrslit** | | **93.936.282** | **49.025** |
| Fluttur vinningur | | 93.936.282 | 49.025 |
| | | **93.936.282** | **49.025** |

# Ogn

| | Nota | 2016 (kr.) | 2015 (tkr.) |
|---|---|---|---|
| Grundøki og bygningar | | 26.562.645 | 26.790 |
| **Materiell støðisogn** | **2** | **26.562.645** | **26.790** |
| **Støðisogn til samans** | | **26.562.645** | **26.790** |
| | | | |
| Áogn av sølu og tænastum | | 10.670.184 | 10.936 |
| Onnur áogn | | 468.013 | 622 |
| **Áogn** | | **11.138.197** | **11.558** |
| **Virðisbrøv** | | **399.508.852** | **325.828** |
| **Tøkur peningur** | | **26.523.735** | **5.297** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **437.170.784** | **342.683** |
| **Ogn til samans** | | **463.733.429** | **369.473** |

## Skyldur

| | Nota | 2016 (kr.) | 2015 (tkr.) |
|---|---|---|---|
| Stovnsfæ | | 93.840.006 | 93.840 |
| Fluttur vinningur | | 361.520.683 | 267.584 |
| **Eginogn** | **3** | **455.360.689** | **361.424** |
| Vøru og tænastuskuld | | 1.763.558 | 793 |
| Onnur skuld | | 6.609.182 | 7.256 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **8.372.740** | **8.049** |
| **Skuld til samans** | | **8.372.740** | **8.049** |
| **Skyldur til samans** | | **463.733.429** | **369.473** |
| **Eventualskyldur** | **4** | | |

# Peningastreymsuppgerð 1. januar – 31. desember 2016

| | Nota | 2016 (kr.) | 2015 (tkr. |
|---|---|---|---|
| Úrslit í tíðarskeiðnum | | 93.936.282 | 49.025 |
| Avskrivingar | 2 | 227.682 | 228 |
| Broyting í rakstrarkapitali | | 744.215 | 1.274 |
| **Peningastreymar frá rakstrarvirksemi** | | **94.908.179** | **50.527** |
| | | | |
| **Broyting í tøkum peningi** | | **94.908.179** | **50.527** |
| | | | |
| Tøkur peningur | | 5.296.818 | 11.748 |
| Virðisbrøv | | 325.827.590 | 268.849 |
| Tøkur peningur 1. januar 2016 | | 331.124.408 | 280.597 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2016** | | **426.032.587** | **331.124** |
| | | | |
| Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis: | | | |
| Tøkur peningur | | 26.523.735 | 5.297 |
| Virðisbrøv | | 399.508.852 | 325.827 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2016** | | **426.032.587** | **331.124** |

## 1 Starvsfólkakostnaður

| | 2016 (kr.) | 2015 (tkr.) |
|---|---|---|
| Lønir | 12.628.311 | 14.140 |
| Eftirlønartryggingar | 1.452.733 | 1.581 |
| Onnur lønartengd gjøld | 585.921 | 538 |
| Annar starvsfólkakostnaður | 215.214 | 138 |
| | **14.882.179** | **16.397** |

Umframt starvsfólkaútreiðslurnar omanfyri er starvsfólkakostnaður eisini innroknaður, sum partur av útreiðslum til arbeiðsleys. Hesin kostnaður er í sambandi við Fjølsmiðjuna og var fyri 2016 tilsamans 1.987 tkr. í mun til 2.917 tkr. í 2015.

Av hesum er samsýning til stjórn og stýrið:

| | | |
|---|---|---|
| Stjórn og stýrið | 1.166.508 | 1.144 |
| | **1.166.508** | **1.144** |
| Miðaltal av starvsfólkum | 34 | 39 |

## 2 Materiell støðisogn

| | Grundøki og bygningar |
|---|---|
| Keypsvirði við ársbyrjan 1. januar 2016 | 28.672.623 |
| Tilgongd í árinum | 0 |
| Keypsvirði við árslok 31. desember 2016 | 28.672.623 |
| Av og niðurskrivingar við ársbyrjan 1. januar 2016 | 1.882.296 |
| Avskrivingar í árinum | 227.682 |
| Av og niðurskrivingar við árslok 31. desember 2016 | 2.109.978 |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2016** | **26.562.645** |

## 3 Eginogn

| | Stovnsfæ | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 1. januar 2016 | 93.840.006 | 267.584.401 | 361.424.407 |
| Ársúrslit | 0 | 93.936.282 | 93.936.282 |
| **Eginogn 31. desember 2016** | **93.840.006** | **361.520.683** | **455.360.689** |

## 4 Eventualskyldur v.m.

Kærunevndin fyri Arbeiðsloysisskipanina hevur í avgerð í desember 2015 staðfest, at føroyskir arbeiðsgevarar hava ikki skyldu at rinda ALS-gjald av útgoldnum lønum, sum ikki eru a-inntøkur.

Føroya Rættur hevur í dómi staðfest niðurstøðuna hjá Kærunevndini, og kann dómurin hava við sær, at Arbeiðsloysis-skipanin kemur í ta støðu, har hon skal rinda ein part av móttiknum ALS-gjøldum aftur. Mett verður, at hetta talið ikki er hægri enn á leið 1,3 mió. krónur.

Grunnurin hevur ein leigusáttmála, har leiguskyldan í uppsagnartíðini er 0,9 mió. kr.

## 5 Nærstandandi partar

ALS hevur avtalu við Trygdargrunn Fiskivinnunar um, at ALS hevur um hendi alla umsiting av virksemi Trygdargrunni Fiskivinnunar.

Arbeiðsloysisskipanin · Postsmoga 3022 · FO-110 Tórshavn
Tel 349550 · Fax 349551 · als@als.fo · www.als.fo